## Hagtølini

**Niðanfyristandandi yvirlit sýnir, hvussu mótstøðuliðini hava staðið seg, tá tey hava tørnað saman í bestu deildini seinastu tíggju árini.**
**Ofta verður nógv tosað um hagtølini undan hvørjum dysti sær, men at hesi sum so ikki nýtast at vera eftirfarandi, mundi dysturin mikudagin vera eitt gott dømi um.**

**-jm**

| | 03 | 02 | 01 | 00 | 99 | 98 | 97 | 96 | 95 | 94 | Í alt | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Skála-HB | 1-3 | 0-3 | - | - | - | - | - | - | - | - | 0-0-2 | 1-6 |
| KÍ-B68 | 0-0 | 3-1 | 2-2 | 4-1 | 5-0 | 4-3 | 2-2 | 1-1 | 4-3 | 6-3 | 6-4-0 | 31-16 |
| GÍ-ÍF | - | - | - | - | 2-1 | 3-1 | 3-1 | 4-1 | - | 8-0 | 5-0-0 | 20-4 |
| NSÍ-VB | 4-0 | 1-0 | 1-1 | 4-0 | 1-0 | 4-1 | 1-4 | - | 0-3 | - | 5-1-2 | 16-9 |
| B36-EB/S | 1-3 | 7-2 | 5-1 | - | - | - | - | - | - | 3-1 | 3-0-1 | 16-7 |

KÍ-B68:

# Bronsuliðið í spildurnýggjari útgávu



*Ikki síðani 1988 hevur B68 fingið fult við sær út Klaksvíkini*

**Hóast B68 ikki hevur vunnið í Klaksvík nógvu tey seinastu árini, so verður tað í Klaksvík ikki mett sum avgreiðslusøk at spæla ímóti toftamonnum**

UPPTAKT
*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*

Í fjør vunnu toftamenn bronsu. Av liðnum frá í fjør er helmingurin av spælarunum burtur, og talan er um lyklaspælarar, sum eru farnir aðra staðni. Í morgin fer B68 til Klaksvíkar við nýggjum liði. Toftamenn kappast við tíðina. Í steypakappingini var úrtøkan sera soltin. Teir arbeiða við at spæla nýggja liðið saman. Hóskvøldið, tá ið teir vandu á Skála (í gjárkvøldið skuldu teir venja í Runavík) vóru B68'arnir so frægt mannaðir til venjingar, sum teir annars ikki hava verið í ár.

Í hesi vikuni eru tveir av nýggju monnunum fluttir til Føroya. Talan er um Mikkjal Thomassen og Herbert í Lon, sum hava gjørt seg lidnar á politiskúlanum í Keypmannahavn.

Stinni íslendski málverjin hjá B68, Albert Sævarsson, hevur í hesi vikuni verið í Íslandi. Hóskvøldið varð sagt á Toftum, at hann skuldi koma aftur á klettarnar undan vikuskiftinum.

Í 1988 eydnaðist tað B68 at vinna 2–0 í Klaksvík. Síðani tá hava teir tapt nakrar ferðir, og fleiri ferðir hevur tað verið javnleikur. Eitt nú í fjør, tá ið tað endaði málleyst.

### Stórur spenningur

Í Klaksvík hevur fótbóltslagið higartil í ár verið gott. Í morgin verður fyrsta týdningarmikla royndin hjá Ove Flindt–Bjerg og hansara monnum. Við steypakappingini í huga kundi tað sæð út sum um, at talan er um lætta uppgerð, men soleiðis síggja teir ikki uppá tað í Klaksvík. KÍ hevur higartil í ár fleiri ferðir havt nógv spæl á heimavølli, men tað hevur ikki altíð gingið so væl at fáa úrtøku burturúr møguleikunum.

Í hesi vikuni hava allir KÍ spælararnir verið til venjingar uttan Ove Nysted, sum ikki verður við tær næstu vikurnar. Allan Joensen og Fríðin Ziskason hava verið skaddir í fleiri vikur. Hóast teir hava vant í hesi vikuni, so eru teir ikki í myndini til dystin ímóti B68.

Jan Andreasen noyddist út við skaða í steypadystinum ímóti NSÍ. Leon Bjartalíð loysti hann av. Jan hevur vant aftur í hesi vikuni, men tað eru møguleikar fyri, at Leon, sum hevur staðið seg væl, fer at fáa møguleikan í morgin.




# Vikuskifti

Nr. 78 • leygardagur • 24. apríl 2004 • 78. árgangur • www.sosialurin.fo

Mamma er rithøvundur

Samrøða við Marjun S. Kjelnæs, rithøvund

Lesið síðu 8–9



# Útjaðari í Italia

Í Mið-Italia finna vit eina sanna útjaðarabygd. Serra San Quirico er ein sera lítil býur, har einans 35 fólk búgva um veturin. Men um summarið fer fólkatalið upp um 1.000, tá øll koma í summarfrí



*Tilsaman 35 fólk búgva um veturin í Serra San Quirico um veturin, harav eru 30 kvinnur. 82 ára gamla Giovanna er ein av teimum*

FERÐAFRÁSØGN
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

**Serra San Quirico:** Bygdin er sera lítil. Men hugtakandi við sínum mongu múrsteinshúsum, sum standa heilt tøtt. Nakað kaldligt tykist tað tó at vera, tí meginparturin av húsunum standa tóm.

Tað er reint og nossligt allastaðni, og ikki nógv fólk at síggja. Tá ferðaleiðarin greiðir frá, at tað búgva einans 35 fólk í bygdini um veturin, er lætt at skilja, hví onki fólk er at síggja.

Meðan vit ganga, greiðir ferðaleiðarin dúgliga frá hesari bygdini, sum er um at doyggja út, tí alt fólkið flytur. Og beinanvegin reikar hugurin heim til Føroya til smáu útoyggjarnar og bygdirnar, har fá fólk búgva, og sum eru við at fáa somu lagnu.

Ferðaleiðarin steðgar við eini hús, eini stór hús, har eitt torn er í erva.

– Um nakar tykkara ynskir at keypa hesi húsini, so eru tey til sølu fyri 3.000 evrur, sigur hann.

3.000 evrur eru um 20.000 krónur. Tað sigur alt um, hvussu lítil eftirspurningurin eftir at búgva í bygdini er.

Húsini verða seld so bíliga, tí tey vita ikki, hvat tey annars skulu gera við tey tómu húsini í bygdini, greiðir ferðaleiðarin frá.

### Kvinnubygd

Eitt annað, sum er serstakt við hesari bygdini, er, at av teimum 35 fólkunum, sum búgva her, eru 30 kvinnur. Allar eldri kvinnur.

Ein teirra, Giovanna, kemur gangandi eftir vegnum við eitt sindur av rósmarin í hondini. Hon steðgar á, tá hon sær ókunnugt fólk og eygleiðir okkum, meðan vit ganga móti henni. Hon byrjar síðani at tosa, og ferðaleiðarin roynir at umseta, men sumt av tí, sum hon sigur, fær hann tó ikki við.

Giovanna er 82 ára gomul og hevur búð í bygdini alt sítt lív so at siga.

– Eg var í Týsklandi sum ung genta og arbeiddi, men tað er nú so øgiliga langt síðani, sigur hon, meðan hon smílist blídliga.

Giovanna sigur, at tað kann gott vera einsligt í bygdini til tíðir, men tey hava altíð summarið at síggja fram til, tá fólkið kemur aftur.

Hon greiðir frá, at maður hennara er deyður, og at sonurin býr saman við henni.

– Eg havi júst verið og fingið mær nakað av rósmarin, tí eg fari at gera enskan búff til døgurða til hansara, tá hann kemur aftur úr arbeiði, sigur hon. Sonurin arbeiðir í øðrum býi har í nánd.

Giovanna tosar longi við okkara ferðaleiðara, men hesin umsetur ikki longur, tí hann helst hevur úr at gera við at lurta eftir henni.

Hon hevur onki ímóti at vera avmyndað, og tað letur ongin okkara sær siga fleiri ferðir. Hetta er ein hugtakandi eldri kona, tí hóast hon er komin væl upp í árini, so tykist hon bæði røsk og førlig. Men brádliga hevur hon fingið nóg mikið av ølum hóvastákinum og við einum harðmæltum ciào, fer hon aftur til gongu oman móti sínum húsi við rósmarininum í hondini, sum sonurin fer at fáa afturvið enska búffinum, tá dagsins gerningur er av.